# Góður matur í hugnaligum umhvørvi



Góður matur

Stílfullur hugni

... í hjartanum í býnum

Avgjørt vert at vitja

Opið frá kl. 17.00

Bílegg borð á 214121

RESTAURANT

Vælkomin

MERLOT

Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121

Sjónband 317774

# Skaðafrøðingur søkist

## TRYGD leitar eftir skaðaviðgera

**STARVIÐ**
Talan er um spennandi starv, har høvuðsuppgáva tín verður at standa fyri skaðaviðgerð, frá fráboðan til útgjald. Tú fert at standa fyri skaðaviðgerð av ábyrgdarskaðum og kaskoskaðum á privatakførum og vinnuakførum, umframt at tú fert at hava um hendi skaðaviðgerð av leysafæi og bygningsskaðum á bæði privatøkinum og vinnuøkinum.

Tað er sera umráðandi, at tú hevur førleika at veita kundanum eina góða tænastu í skaðaviðgerðini, og at tú samstundis tryggjar honum tað endurgjald, ið hann hevur rætt til.

**TÚ**
Tú hevur nøktandi útbúgving til starvið og hevur helst fleiri ára royndir á viðkomandi øki. Tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt, men tú trívist somuleiðis í toymum. Tú hevur eisini yvirlit og megnar at hava nógvar bóltar í luftini samstundis. Tú tekur ábyrgd, dugir væl at raðfesta og at arbeiða saman við øðrum, umframt at tú hevur ein fínan sans fyri handilslívi.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Finansforbundet. Tú fært eina góða, fasta løn. Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við curriculum vitae og viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 1. juli 2007. Send umsóknina til P/F TRYGD, att.: Ella Mortensen, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til elm@trygd.fo.

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREIST ER 1. JULI 2007**

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 35 fólk, og vit umseta fyri meira enn 75 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

TRYGD
leitar eftir tær.

REPROZ




# Lærlingar til Elding
## í Saltangará og í Miðlon í Havn

Til Elding í Saltangará og Miðlon í Havn, søkja vit eftir lærlingi at byrja skjótast tilber.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio, sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læruupláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Vit vænta at tú ert ágrýtin, og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Í lærutíðini er møguleiki er at koma í handlar uttanlands hjá Elgigantinum.

Nærri upplýsingar um læruplássið fáast frá Mads A. Winther, stjóra, á tel 21 62 30.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. august 2007 og skal sendast til:
Elding, Postboks 1289, 110 Tórshavn,
att: Mads A. Winther.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ELDING

*Elding er førandi innan sølu av elektriskum lutum og hvítvørum. Høvuðsveitari hjá Elding er EL-Giganten, sum er størsta handilsketa av sínum slag í Norðurlondum.*

petur & petur • 320870

Kom til framløgu um

# Gransking, menning og nýskapan í Føroyum 2007

Granskingarráðið hevur spurt, hvat tað almenna og vinnulívið gera fyri at granska, menna og fremja nýskapan.
Kanningin vísir, at vit granska alt ov lítið samanborið við onnur lond, hóast nógv nýskapan er í vinnuni.

Kom til framløguna og hoyr um kanningina og tilmælini frá Granskingarráðnum.
Framløgan verður á Hotel Hafnia, týsdagin 26. juni 2007, kl. 10-12.

**Skrá**
Eyðun Andreassen, formaður í Granskingarráðnum, greiðir frá um kanningina.

Heini Hátún, verkætlanarleiðari, leggur fram úrslit og tilmæli.

Aftan á framløguna verður ábit.

samit.fo

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo